# Ole tænti Bureau Veritas í 30 ár

**Bureau Veritas, sum byrjaði sítt virksemi í 1828, klassaði fyrsta føroyska skipið, 9. september í 1863**

LEIÐARASKIFTI
*Vilmund Jacobsen*



*Leiðaraskifti á Bureau Veritas. Ole Lauritsen, sum hevur starvast hjá felagnum í tríati ár, letur starvið til Tummas Eli Høj Joensen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjadagin, 27. september, var móttøka á Hotel Hafnia í samband við, at klassafelagið, Bureau Veritas í Føroyum, sum hevur heimstað á Strondum, skiftir leiðara.

Leiðarin seinastu tríati árini, 69 ára gamli, Ole Lauritsen, leggur frá sær, og í hansara stað kemur, Tummas Eli Høj Joensen, sum er giftur og býr á Strondum.

Skrivstovan hjá Bureau Veritas hevur øll árini verið í húsunum hjá Ole, og nú nýggjur leiðari er settur, flytir skrivstovan um ein mánaða ella so í hølir, sum Tummas Eli ger til reiðar í sínum húsum.

Ole er føddur og uppvaksin í Danmark, men giftist Gynnu av Strondum. Tey fluttu heim til Føroya at búgva í 1967.

## 6-7 feløg

Ole sigur, at klassafelagið, Bureau Veritas, er eitt privat felag, sum tekur sær av at klassa skip. Felagið, sum er tað elsta av sínum slagi, er stovnað í 1828 og klassaði fyrsta føroyska skipið 9. september í 1863.

Bureau Veritas er eitt altjóða felag, sum hevur høvuðsskrivstovu í París, men hevur fleiri enn 500 skrivstovur kring um í heiminum.

Í Føroyum virka eini 6-7 ymisk klassafeløg, og felags fyri hesi er, at tey skulu góðkennast av myndugleikunum.

At enda kunnu vit upplýsa, at fartelefonin hjá nýggja leiðaranum, Tummas Eli Høj Joensen, er 221753.

Fíggjarlógaruppskotið:

# Eingin stuðul til blaðútbering

**Líkt er til, at blaðútberinging ongan góðan eigur. Í øllum førum var ikki rúm fyri henni á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003. Karsten Hansen og Bjarni Djurholm hava hvør sína søgu um, hvussu hetta kom at vera so**

ÚTBERING
*Heri á Rógvi*



*Sosialurin og Dimmalætting fingu tann stuðul, tey høvdu miðjað eftir á fíggjarlógini til blaðútbering*

Í eini fíggjarlóg skulu nógvir endar fáast til at røkka saman, og tað er ikki alt, ið verður tikið við. Í so máta er fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 einki undantak.

Hesar seinastu dagarnar, síðani fíggjarlógaruppskotið varð almannakunngjørt, hevur nógv at frætta um fólk og stovnar, sum halda seg hava fingið ov lítið í sín part.

Tvær fyritøkur, sum ikki kunnu siga at vera heilt væl nøgdar, eru Dimmalætting og Sosialurin. Hesar báðar fyritøkurnar geva dagbløðini Sosialin og Dimmalætting út, sum eru tvey tey størstu tíðindabløðini í Føroyum.

Ein partur av virkseminum hjá Sosialinum og Dimmalætting er at bera síni bløð út. Til fyri fýra árum síðani var tað Postverk Føroya, ið stóð fyri at bera tey bæði bløðini. Kostnaðurin var um 70 oyru fyri hvørt blaðið, og borið varð út dagin eftir, at blaðið var prentað, t.e. týsdagsbløðini verða prentaði mánadag seinnapart og vórðu borin út týsdag. Postverkið bar eisini út leygardag.

Seinasta landsstýrið við fyrst Finnboga Arge sum vinnumálaráðharra gjørdi av, at Postverk Føroya í størri mun skuldi skapa sítt egna grundarlag við sjálvt at fíggja sín egna rakstur. Hetta gjørdi, at Bergur í Garði, stjóri fyri Postverk Føroya, gjørdi av, sparingar skuldi fremjast og fleiri inntøkur skuldu fáast til Postverkið. Hann gjørdi tískil av at gevast við postútbering leygardagar og prísurin fyri at bera bløðini út fór nógv upp.

Hetta gjørdi so aftur, at Dimmalætting og Sosialurin setti sínar prísur upp, men kundi ógvuliga illa liva við teimum øktu útreiðslum, ið broytingin hevði við sær.

Síðani tá hava Dimmalætting og Sosialurin í felag roynt at ávirka politiska myndugleikan, soleiðis at stuðul so ella so varð givin til blaðútberingina.

Jan Müller, stjóri fyri Sosialin, sigur, at Sosialurin saman við Dimmalætting í skjótt fýra ár hevur verið á fundum við fleiri landsstýrismenn og sjálvt við løgmann. Allir hava teir víst stóran vælvilja, men eingin stuðul er komin kortini.

Hjalgrím Samuelsen, stjóri fyri Dimmalætting, sigur, at tað ynskiliga hevði verið, um dagbløðini kundi fingið stuðul til at betra um tænastuna. Bæði hann og Jan Müller vísa, at hetta er púra vanligt í øðrum Norðanlondum. Í Danmark verður umleið 500 mió játtaðar árliga til útbering av bløðum.

– Vit hava roknað okkum fram til, at tað fyri umleið tvær milliónir árliga vildi borið til at borið bløðini út til allar bygdir við 500 ella fleiri íbúgvum sama kvøld, sum tað verður prentað, sigur Hjalgrím Samuelsen.

Hann greiðir frá, at ikki verður Postverk Føroya, sum fer at standa fyri hesari útberingini, men tað vera bløðini sjálvi, tí sáttmálarnir hjá Postverki Føroya gera hetta mestsum ómøguligt at royna í verki.

## Pengarnir vóru klárir

Sum nevnt hevur málið um útberingina ferðast nógv aftur og fram í landsstýrinum. Fyri einari tíð síðani valdi løgmaður at taka um endan, og hann plaseraði málið hjá Vinnumálaráðnum og Bjarna Djurholm, sum eisini umsitur Postverk Føroya.

Bjarni Djurholm greiðir frá, at í samráð við løgmann varð gjørt av, at játtast skuldu 1,9 mió. til blaðútberingina. Peningurin varð ætlaður sum partur av økismenningini, soleiðis at fleiri føroyingar fingu javngóða atgongd til tað skrivaða orðið í bløðunum.

– Tað eydnaðist okkum at finna pengarnar internt hjá okkum við at gera nakrar sparingar á egnum kontoum. Hetta boða við landsstýrismanninum í fíggjarmálum frá, men tá uppskotið verður almannakunngjørt eru hesir pengarnir horvnir, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum av sínum eintingum hevur tikið pengarnar av.

– Tað er undanførsla, um hann sigur nakað annað. Pengarnir vóru spardir hjá okkum sjálvum, og vit bóðu ikki um nakra meirjáttan, sigur Bjarni Djurholm.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum fer at boða fíggjarnevndini frá hesum, tá hon fer í holt við at viðgera fíggjarlógaruppskotið fyri 2003.

Bjarni Djurholm veit eisini at siga, at málið við útberingarstuðulinum varð borin niðan í tingið av Karsten Hansen í seinastu tingsetu, men hann tók tað sjálvur aftur.

## Ov seint

Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, sigur, at tað er ikki rætt, tá sagt verður, at tað er hann, sum hevur tikið stuðulin til blaðútbering av fíggjarlógaruppskotinum.

– Orsøkin til, at tað ikki er við, er tí, at tað kom ov seint. Tað var í síðstu løtu, at teir komu í tankar um tað og komu við tí, men tá var ikki møguleiki at viðgera tað, sigur Karsten Hansen.

– Her er ikki talan um nakra forgloymilsi frá mínari sínu, sigur Karsten Hansen.

Hann sigur seg ikki sjálvan vera ímóti sjálvum uppskotinum, menhann heldur, at tað eigur at fáa eina viðgerð efti vanligari mannagongd. Hann er heldur ikki ímóti, at stuðulin til blaðútberingina verður tikin við í eftir viðgerðina í løgtinginum.



# 200 stóra undirtøku í Íslandi

**Føroyski bólkurin 200 vitjaði í Íslandi um vikuskiftið og ferðin varð væl eydnað og fløga teirra er eisini væl umtókt**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*



*200 í Íslandi*

*(Mynd. Ingólfur Júlíusson)*

Fríggjakvøldið leikti føroyski rock-punk bólkurin 200 á barrini Cirkus í Reykjavík. Stúgvandi fult var av fólki og fleiri sluppu ikki innar. Leygarkvøldið leikti 200 á Grand Rokk saman við írska bólkinum The Dudley Corporation og somuleiðis gekk sera væl.

Tað er heilt greitt, at 200 eru væl dámdir í íslandi. Føroyska bylgjan byrjað rættuliga við Týr, sum í Íslandi verður róptur superbólkur, og bíðað verður við spenningi eftir nýggju fløguni frá Týr.

Og eins og fleiri onnur, so megna eisini 200 at undir seg nýtt land.

200 skal møguliga aftur til Ísland seinni at leika á tónleikafagnaði og undanvindurin um vikuskiftið ger óivað ikki møguleikarnar fyri hesum verri.

Suðurrás:

# Opið hús og sending



**Suðurrás verður í vetur partur av vetrarskrá Útvarpsins. Í dag, hósdagin, verður fyrsta sendingin at hoyra og Suðurrás hevur í hesum sambandi opið hús í hølum sínum**

ÚTVARP
*Dagfinn Olsen*

Nýggja Útvarpsrásin í Suðuroynni, Suðurrás, verður í vetur regluligur partur av skránni hjá Útvarpi Føroya. Fyrsta sendingin verður at hoyra í dag, hósdag, klokkan 17:05.

Lagt var til brots á Jóansøku, tá skipað var fyri eini beinleiðis sending av jóansøku í Vági. Suðurrás fekk tá góða og serkøna hjálp frá Jákupi Magnussen, útvarpsmanni, tí tá var júst farið undir fyrireikingarnar til nýggju rásina og manningin helt seg ikki rættiliga til at senda, men við góðari hjálp var hildið, at til bar at nýta henda gylta møguleika at gera vart við rásina. Og væl bar til.

Men síðani hevur ikki stórvegis verið at hoyrt til Suðurrás, okkurt innslag í onkrari morgunsending. Men nú verður veruliga lagt til brots. Suðurrás skal standa fyri eisini regluligari sending á vetrarskrá Útvarpsins. Sendingin hevur heitið Viðurgerði, ið var tann jarðarteigurin, ið varð lagdur afturat, tá garðarnir vórðu útfluttir.

## Opið hús

Enn er manningin ikki stór á Suðurrás og hóast hølisumstøðurnar eru góðar, so er enn okkurt eftir at taka hond í. Men alt hetta kemur væntandi skjótt í rættlag. Fleiri hava longu víst áhuga í at taka eina hond við í útvarpsarbeiðinum og manningin í Suðurrás væntar og vónar, at fleiri leggjast afturat, nú gongd kemur á og sent verður regluliga.

Í samband við fyrstu sendingina hevur Suðurrás opið hús í hølum sínum, ið eru á ovastu hædd á Litbúðini í Vági. Allar kommunur í oynni, ið hava stuðlað útvarpsætlanini sera væl, hava fingið innbjóðing og allir suðuroyingar eru vælkomnir inn á gólvið á Suðurrás hósdagin millum klokkan 17 og 18:30. Manningin á Suðurrás vónar at síggja nógv fólk og vónar eisini, at áhugin verður vaktur hjá onkrum fyri at royna seg við mikrofonini.

Opið hús verður, meðan fyrsta sendingin er í luftini, og møguleiki er at hoyra sendingina í hølunum hjá Suðurrás.

Sendingin Viðurgerði verður á vetrarskránni hjá ÚF hvønn hósdag klokkan 17:05 og endursent verður klokkan 14 týsdagar.

# Stórur áhugi fyri nýggjari leið

**Longu fyrsta túrin hevur føroyska útflutningsvinnan tikið væl ímóti nýggju møguleikunum at flyta farm beinleiðis til Skotlands við Smyril Line**

NÝGGJ FARLEIÐ
*Tíðindaskriv*

Týskvøldið 1. oktober fór farmaskipið Clare hjá Smyril Line av Havnini tann fyrsta túrin til Aberdeen á nýggju Skotlandsleiðini, og longu frá byrjan verður tikið væl ímóti nýggju møguleikunum at flyta farm av landinum

– Áhugin fyri rutuni hevur verið stórur, og tann fyrsta túrin til Aberdeen eru upp ímóti 30 trailarar við fiski umborð. Tað er nógv meira, enn vit høvdu vónað henda fyrsta túrin, sigur Heðin Joensen, leiðari á farmadeildini hjá Smyril Line.

Hesin fyrsti farmurin við fiski er hampiliga javnt býttur millum feskan og frystan fisk.

Á túrinum heim aftur til Føroya er knappliga so nógv góðs umborð, og tað hevur sínar náttúrligu orsøkir.

– Enn er kunnleikin til rutuna ikki líka stórur aðrastaðni, sum hann er í Føroyum. Vit rokna tó við, at áhugin fyri rutuni fer at økjast so hvørt, hon kemur í eina fasta legu, og kunnleikin økist, sigur Heðin Joensen.

Føroyska útflutningsvinnan hevur nú møguleika at senda fisk og aðrar vørur av landinum sjóvegis sjey ferðir um vikuna, og Smyril Line stendur fyri trimum av ferðunum. Smyril Line fer í vetur at sigla til Aberdeen við Clare, og seinni fer nýggja Norröna at yvirtaka skotlandssiglingina í vetrarhálvuni.

## Eisini fyri ferðafólk

Hóast tað fyrst og fremst er útflutningsvinnan, ið hevur fingið eina nýggja inngongd til bretska og evropeiska marknaðin við nýggju rutuni hjá Clare, so er eisini møguligt hjá ferðandi at brúka nýggja møguleikan.

Pláss er fyri 12 ferðafólkum umborð á Clare, og tey, ið eru áhugað, kunnu gleða seg til ein øðrvísi túr til Aberdeens.

– Vit fara at gera tað, vit eru mentir, til tess at fólk skulu kenna seg væl umborð, sigur skiparin á Clare Jørgen Mortensen.

Hann hevur siglt á Atlantshavinum við skipum hjá danska reiðarínum DFDS í seksti- og sjeytiárunum, og nú er hann aftur á teimum gomlu leiðunum.

– Hetta er spennandi, og tað er ein avbjóðing at royna eina nýggja leið sum henda millum Føroyar og Aberdeen.

